

## Málið er vøkstur

Tann nýggja ES-nevndin, sum hevur sín fyrsta arbeiðsdag í dag, hevur sett sær sum sítt fremsta mál at virka fyri búskaparligum vøkstri í samveldinum, so londini kunnu sleppa skjótari upp úr kreppuni. Men búskapurin er ikki tað einasta, sum stendur ovarlaga á dagsskránni hjá nevndini, tí ætlanin er eisini at fáa gongd á veðurlags- og orkumálini. Tað sigur formaðurin, José Manuel Barroso, sum varð valdur til eitt formansskeið afturat í september í fjør. ES-tingið góðkendi í gjár teir 27 nýggju kommiserarnar við 488 atkvøðum fyri og 237 ímóti. 72 tinglimir atkvøddu ikki.

## Brown skal svara

Nevndin, sum kannar bretsku luttøkuna í krígnum í Irak, fer í næsta mánaði at avhoyra Gordon Brown, forsætisráðharra . Upprunaliga ætlaði nevndin ikki at avhoyra Brown fyrr enn aftan á parlamentsvalið í juni, men eftir trýsti frá andstøðuni hevur forsætisráðharrin sagt seg vera til reiðar at møta nevndini í mars. Grodon Brown var fíggjarmálaráðharri, tá kríggið í Irak byrjaði í 2003, og alment hevur verið sagt, at hann átti rættiliga lítlan lut í avgerðini hjá stjórnini at leypa á Irak. Tony Blair, sum var forsætisráðharri tá, var til avhoyringar í nevndini í síðsta mánaði.

# Vildi ikki prógva síni sjónarmið í rættinum

**- Tann, sum vil hava viðhald í einum rætti má prógva síni sjónarmið, men tað helt Starvsmannafelagið vera óneyðugt í Fasta Gerðarrættinum, sigur nevndarformaðurin. Hann harmast um støðuna, men leggja dómararnir frá sær, fer hann sama veg**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Tað er ómetaliga harmiligt, at fakfeløgini nú hava mist álitið á Fasta Gerðarrættinum.

Tað staðfestir Kári á Rógvi, formaður í nevndini fyri Fasta Gerðarrættin.

Ónøgdin hjá fakfeløgunum við Fasta Gerðarrættin er so stór, at í gjár heittu Føroya Arbeiðarafelag, Havnar Arbeiðsmannfelag og tey bæði arbeiðarafeløgini í Klaksvík, beinleiðis á dómararnar um at leggja frá sær.

Gera teir ikki tað, er vandi fyri, at fakfeløgini taka seg burtur úr Gerðarrættinum.

Nevndarformaðurin ásannar, at fakfeløg hava rætt til at taka seg úr gerðarrættinum.

Men hann heldur, at tað hevði verið spell, tí gerðarrætturin er eitt barn hjá fakfeløgunum sjálvum, men at tað ræður eisini um at brúka teir møguleikar, sum eru í honum og tað heldur hann ikki, at fakfeløgini hava gjørt í hesum føri.

Nevndarformaðurin ger greitt, at hann fer ikki at heita á dómararnar um at leggja frá sær, tí tað heldur hann er skeivt.

Men hendir tað, at dómararnir sjálvir leggja frá sær, fer nevndarformaðurin at gera tað sama.

### Vildu ikki føra prógv fram

Kári á Rógvi heldur kortini, at Starvsmannfelagið má sjálvt bera eina stóra ábyrgd fyri, at málið um portørarnar liggur sum tað liggur.

- Fyri tað fyrsta hevur Starvsmannafelagið ikki brúkt teir møguleikarnar, tað hevur í Gerðarrættinum og tað haldi eg, at tað átti at gjørt, áðrenn tað brúkar so sterkar vendingar sum at fordøma niðurstøðuna hjá rættinum.

Hann vísir eisini á, at at tann, sum vil hava viðhald í einum rætti, má føra sjónarmið fram, sum styðja uppundir síni krøv.

- Tað er liggur innast í mønini á løgfrøðingum, at tann, sum vil fáa viðhald í einum máli, má undirbyggja síni sjónarmið, antin við lógargreinum, ella við vitnum, frágreiðingum, ella øðrum, sum vísir, at talan er um lógarreglu ella um eina siðvenju.

- Men tað gjørdi Starvsmannafelagið ikki í hesum føri, tí tey hildu, at tað var óneyðugt at lýsa støðuna og at føra prógv fyri hesi siðvenju, staðfestir hann.

- Løgfrøðingurin hjá Starvsmannafelagnum førdi fram í Fasta Gerðarrættinum, at tað er siðvenja, at tað er ikki neyðugt at boða frá verkfalli frammanundan.

- Men tað stendur svart á hvítum í úrskurðinum, at hann samstundis helt, at tað er óneyðugt hjá honum at føra prógv fyri hesum.

- Eg haldi, at heldur Starvsmannafelagið fast um, at talan er um eina siðvenju, áttu tey at ført sjónarmið fram í rættinum, sum undirbygdu tað, tí Gerðarrætturin hevur onki at gera uttan at døma útfrá tí tilfari, sum er lagt fyri hann.

- Kenna dómararnir ikki til hesa siðvenju, er bara eitt at gera og tað er at upplýsa teir um, leggur hann afturat.



*Leggja dómararnir í Fasta Gerðarrættinum frá sær, geri eg tað sama, sigur Kári á Rógvi, formaður í nevndini fyri Fasta Gerðarrættin. Hann sigur, at í gerðarrættinum vildi Starvsmannafelagið vildi ikki føra prógv fyri, at tað er ein siðvenja, at tað er óneyðugt boða frá verkfalli frammanundan*

Nevndarformaðurin í Fasta Gerðarrættinum staðfestir, at tað er neyðugt at føra tey røttu sjónarmiðini fram á røttum staði, men tað er ikki hent í hesum føri.

### Kunnu krevja nýggja viðgerð

Hann leggur afturat, at í grein 11 stk 2 í sáttmálanum um gerðarrættin stendur, at er talan um prinsippmál, kunnu partarnir krevja, at málið verður tikið uppaftur við øllum átta dómarunum.

Tann møguleikan hevur Starvsmannafelagið heldur ikki brúkt, sigur nevndarformaðurin.

Hann Kári vísir eisini á, at tað eru fakfeløgini, sum eiga fasta gerðarrættin og tí heldur hann at tað er stórt spell, at tey ikki brúka teir møguleikar, sum liggja í skipanini.

*….Kutyma er okkara óskrivaða rættarregla……Hann (løgfrøðingurin hjá Starvsmannafelagnum, blm.) helt ikki, at tað var neyðugt hjá honum at prógva, at tílík kutyma um at boða verkfall uttan at freist var galdandi, tí hon var so inngrógvin, at tað mátti vera Fíggjarmálaráðið, sum hevði próvbyrðuna fyri, at kutyman ikki var galdandi….*

**Brot úr úrskurðinum hjá Fasta Gerðarrættinum um verkfallið hjá Portørunum**

*….Í serligum føri kunnu formenninir tó í semju, eftir áheitan frá parti, innan fyri fýra vikur frá úrskurði, taka málið upp av nýggjum sum týðandi mál, har allir gerðarrættarlimirnir eru við....*

**Grein 11 stk 2 í sáttmálanum um Fasta Gerðarrættin**

# Dómari afturvísur skuldseting blankt

**Halgir Winther Poulsen, formaður í Fasta Gerðarrættinum hevur ikki tikið endaliga støðu til um hann fer at eftirlíka ynskinum frá fýra stórum fakfeløgum um at leggja frá**

ARBEIÐSMARKNAÐUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Halgir Winther Poulsen, formaður í Fasta Gerðarrættinum, vísur blankt aftur, at gerðarrætturin hevur skert verkfalsrættin hjá fakfeløgunum.

Tað gjørdi hann í tíðindunum á Rás2 í gjár, har hann samstundis staðfesti, at hann hevur ikki gjørt andaliga av um hann fer at fyklgja inniligu áheitanini frá fýra arbeiðarafeløgum um at leggja frá sær.

Tað eru tey fýra arbeiðarafeløgini, Føroya Arbeiðarafelag, Havnar arbeiðsmannafelag og bæði Arbeiðarafeløgini í Klaksvík sum í gjár gjørdu greitt, at tey hava mist álitið á Fasta gerðarrættin í kjalavrørrinum á úrskurðinum um verkfallið hjá portalinum, har niðurstøðan var, at verkfall skuldi fráboðast við rímiligari freist, men ongin ávís freist varð ásett.

Hetta taka fakfeløgini sum eina roynd at skerjja verkfalsrættin.

Men hesum vísir rættarformaðurin staðiliga aftur, tí gerðarrætturin hevur greitt staðfest, at portørarnir hava fullan rætt at fara í verkfall.

- Tað einasta, vit hava gjørt, er at siga, at ein tað má vera ein ávís tíðarfreist, tá ið verkfall verður fráboðað.

- Tað er ein ógvuliga mildur máti at nútímansgera tað at fara í verkfall í einum nútímans samfelagi.

Hann vísir á, at í fyrsta umfarið vóru allir fimm virkandi dómarin fullsamdir um, at Portørarnir høvdu fullan rætt at fara í verkfall, men at freistin upp á ein tíma var ov stutt freist.

Í øðrum umfari vóru fýra dómarar samdir um, at ein freist upp á 16 tímar var eisini ov stutt freist.

Men Gerðarrætturin vil ikki áseta nakra ávísa freist, tí tað halda vit, at sáttmálapartarnir eru best førir fyri at áseta freistina sínamillum.

Halgir Winther Poulsen sigur, at úrskurðurin er gjørdir útfrá tí tilfarið, sum partarnir løgdu fram.

Hann sigur, at tað hevur týdning, at fakfeløg ikki hava álit á honum, men tað er nevndin, sum hevur valt dómararnar og so leingi nevndin ikki missur álit á honum, vil hann ikki taka endaliga støðu um at leggja frá sær.

Fakfeløgini siga, at tað var ikki ætlanin við gerðarrættinum at staðfesta, at verkfall skal fráboðast við tíðarfreist.

- Endamálið við gerðarrættinum er staðfest í sáttmálanum og tað er at taka støðu til ósemjur og at menna føroyskan arbeiðsrætt. Og eg meini framvegis, at vit hava fulla heimild at taka tað støðu, vit hava tikið í hesum máli, sigur hann við Rás2.